# FÓLKIÐ FYRST

## Nú fáa vit møguleikar...

## Virðilig ellisár



Umstøðurnar hjá okkara eldru skulu batast! Tí setir Javnaðarflokkurin sær fyri at

- byggja 160 ellis- og røktarheimpláss
- fáa eina døgnrøktarskipan, so okkara eldru kenna seg trygg!
- útvega eldraíbúðir í góðum umhvørvi!
- bøta heimarøktina!
- hækka pensjónina og samhaldsfasta til 10.000 fyri støk og 16.000 fyri hjún.

Tey eldru bygdu okkara samfelag – vælferðarsamfelagið. Men í dag røkkur pensjónin ikki til. Tað er tørvur á 250-300 plássum á ellis- og røktarheimum. Heimahjálpin hevur avmarkaða orku og nógv eldri klára seg ikki sjálvi! Kunnu vit bjóða okkara eldru hesi kor?

NEI! Tí skal ein miðvísur eldrapolitikkur fremjast.

Hesin er Javnaðarflokkurin borganin fyri!

# JAVNAÐARFLOKKURIN





*Tey royna at billa tær inn, at føroysk lesandi missa rættindi, tá Føroyar vinna fult sjálvstýri.*

**Hetta er ikki so!**

Sum sjálvstøðugur føroyingur varðveitir tey rættindi, ið tú hevur nú, bæði í Danmark og í øðrum londum. Norðurlond hava avtalu um, at norðurlendskir borgarar frítt kunnu útbúgva seg í øllum Norðurlondum. Tað er váttað, at Føroyar eins og Ísland gerast partur av hesum avtalum, uttan at gjalda fyri skúlagongdina. Tá Føroyar eru sjálvstøðugar kunnu vit harumframt gera avtalur við ES og onnur lond víða um heim. So tú fært eins góð ella betri rættindi sum sjálvstøðugur føroyingur at útbúgva teg uttanlands.

**Fullveldi gevur samband við allan heim!**

Tey royna at billa tær inn, at tú ikki fært lestrarstuðul, tá tú ert sjálvstøðugur føroyingur.

**Hetta er ikki so!**

Lestrarstuðulin er longu hækkaður, so hann er millum teir bestu í Norðurlondum. Føroya landsstýri hevur skotið upp, at 60 mió. kr. verða settar av til eina fullfíggjaða føroyska lestrarstuðuls-skipan.
Harafturat er stuðulin til lesandi uttanfyri Norðurlond til skúlagjald hækkaður úr 60.000 til 120.000 kr. árliga.
Hetta er nú besta skipan í øllum Norðurlondum.

**Fullveldi gevur tær møguleika at útbúgva teg, har tú vilt!**



FULLVELDI GEVUR
**SAMBAND VIÐ ALLAN HEIM**
ÚTBÚGV TEG HAR TÚ VILT

Team 85